# HEILSANIR



**Hey Birna tín lekra steik!**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum 1. august. Her ert tú bara skide lekkur sum altíð!!!
**Heilsan DYYYYYD**



**Góða allarbesta Steintóra**
Omma og abbi ynskja tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 26. juli. Alt gott í framtíðini.
**Ynskja omma og abbi í Klaksvík**



**Góða elskaða Steintóra**
Vit á Bakkanum ynskja tær hjartaliga tillukku við 3 ára degnum, vit elska teg.
**Bestu ynskir frá okkum øllum Jákup og Elsa Maria**



Hesin fyllir 35 í dag. Her ert tú fittur, nú ert tú bara fittur. Tillukku við degnum.
**Heilsan vit úti á bø**



Hey! Hesin fyllur 35 í dag. Her ert tú lítil og fittur, nú ert tú bara fittur. Tillukku við degnum.
**Heilsan »Málarin«**



**Góði Pauli**
Hesin flotti maðurin verður bara yngri og flottari. Hann er nú vorðin 50 ár og er í toppformi. Vit vilja ynskja honum hjartaliga tillukku. Alt tað besta ynskja vit tær og mong ár framyvir.
**Heilsan lítlasystir.**



**Góða omma**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Takk fyri alt tú ert fyri okkum.
**Ynskja Ommubørnini**



**Góðu elskaða Súni og Karl**
Hjartaliga tillukku á 1 og 2 ára døgunum tann 4. og 5. august.
**Tær kærastu heilsanir mamma, babba og Mathias**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, ið mintust til mín á konfirmatiónsdegnum tann 8/4.
**Ynskir Bergur Mortensen**



Hjartans tøkk senda vit øllum tykkum, sum við blómum, gávum, fjarritum og á annan hátt hjálptu til at gera dagin so hugnaligan og ógloymandi.
**Gunnvá og Bo**



**Góði elskaði Teitur!**
Hjataliga tillukku við 4 ára føðingardegnum 6/8. Bestu ynskir framyvir.
**Mamma, babba, Ragnar og Stefan**



**Góða Judith**
Hjartaliga tillukku við 50 ára degnum. Takk fyri alt.
**Ynskja børnini og svíðarbørnini**



# TILTØK

## FØÐINGAR

Eg eiti Jónas Mittún Peltonen.
3 juli fekk eg eina lítlasystir, hon vigaði 4040 gr. og var 53 cm long. Foreldur okkara eru Annika Mittún Jacobsen, Tórshavn, og Eino Tapio Peltonen, Helsinki.



1. juni fingu Margit M. og Pauli Baadsager, Valby, Danmark, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4000 gr.

21. juli fingu Beinta Simonsen av Sandi og Erling Arnarson, Akranes, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3156 gr.

23. juli fingu Dorit og Heri Steinberg, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 4300 gr.

24. juli fingu Arnvør M. og Rói á Torkilsheyggi, Nes, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4150 gr.

27. juli fingu Annika Smith og Haldur Suni Johansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 3340 gr.

27. juli fingu Malena Klemmentsen og Osvald Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3900 gr.

27. juli fingu Joan Sandursdóttir og Tummas Johannesen, Strendur, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3200 gr.

29. juli fingu Nelsi og Oddfinn Nilssen, Sandur, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4750 gr.

31. juli fingu Karin Vatnsdal og Benny Forná, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4800 gr.

31. juli fingu Bára Sólheim Thomsen, Fuglafjørður, og Jan Guttesen, Tórshavn, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 3950 gr.

## ANDLÁT

26. juli
Annemi Petersen, fødd Thomsen, úr Hvalvík, búsitandi í Danmark, 89 ára gomul.
Jákup Haraldsen, vanliga nevndur Jákup á Tormansbakka, í Miðvági, 85 ár.
Signhild Magnussen, í Sandavági, 81 ára gomul.

27. juli
Jenny Rasmusssen á Hellum, Strendur, 74 ára gomul.

29. juli
Monika Maria Kunoy, Tórshavn, 90 ára gomul.

30. juli
Joen Pauli Joensen, vanliga nevndur Pauli á Bakka, í Vági, 72 ára gamal.

31. juli
Dánjal Dánjalsson, vanliga nevndur Dánjal hjá Viktor, í Klaksvík, 79 ára gamal.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygardagin 4. aug.: Leif Mosekilde, tlf. 448016
Sunnudagin 5. aug.: Gøran Ytterholm, tlf. 444038

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

**Gudstænastur**
8. sunnudag e. trinitatis
Vesturkirkjan: Bergur D. Joensen kl. 11 (Talvan gongur fyri Føroysku Sjómansmissiónina)
Hestur: Bergur D. Joensen kl. 13.30, altargongd
Glyvrar. Meinhard Bjartalíð kl. 11
Havnar kirkja: Bjarni Bæk kl. 11
Svínoy: Elsa Funding kl. 12
Miðvágur: David Johannesen kl. 11
Gjógv: Emil Olsen kl. 12, messa
Selatrað: Jógvan Fríðriksson kl. 11, altargongd
Haldórsvík: Inga Poulsen Dam kl. 11
Tjørnuvík: Inga Poulsen Dam kl. 12
Kollafjørður: Martin R. Jacobsen kl. 11
Kaldbak: Sonja Klein kl. 12
Christianskirkjan: Niels Pauli Danielsen kl. 11, altargongd
Øravík: Petur M. Rasmussen kl. 12.15, altargongd
Sandur: Jákup R. Hansen kl. 12

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Sunnudagin kl. 17.30: Bønarløta.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Boga og Jüttu Olsen.
Mikumorgun kl. 7.00: Bønarløta.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

**Katólska kirkjan**
Í dag kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa við Jacque Adams í Mariukirkjuni.

**Meinigheitshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Derhard Olsen.

**Ebenezer**
Sunnudagin:
kl. 10.00: Breyðbróting,
kl. 18.00: Evangeliskt møti,
kl. 21.00: Útimøti.
Mikukvøldið kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00: Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti v/ Tummas Jacobsen, kl. 18.00: Kvøldmøti v/ Rúna Rasmussen, kl. 22.00: Útimøti v/ Samkomuni í Hoyvík.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo http://www.filadelfia.fo

**Hvítusunnusamkoman**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00: Sunnudagsskúli.
Sunnukvøldið kl. 17.00: Møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 17.30 bøn og kl. 18.00 møti. Kl. 22.00 verður útimøti á Vaglinum. Til bæði møtini verður luttøka við okkara summargestum úr Norra, Rúnu og Heðin. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ fríum vitnisburði.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bíbliu- og bønarmøti.

**Skála meinigheitshús**
Sunnukvøldið kl. 19.00 verður útimøti á økinum hjá Sparikassanum við luttøku av Jóannes Fonsdal, Magna Christiansen og øðrum. Aftaná verður drekka og sangløta í meinigheitshúsinum. Innsavnan verður til húsið. Hjartaliga vælkomin.

**Keldan í Skálafirði**
Í kvøld kl. 21.00: Opið hús. Sunnukvøldið kl. 19.00: Møti v/ Paula Høj. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Missións- og ungdómshúsi á Glyvrum**
Møti verður sunnukvøldið kl. 19.00 v/ Meinhard Hansen. Evni: Ísrael. Innsavnan verður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Kvøldmøti kl. 18.00: Karen og Curt Nielsen luttaka. Øll eru vælkomin.

**Café One Way, Tvøroyri**
Leygarkvøldið 4. aug. kl. 21.00: Útifundur. Caféin er opin. Sunnukvøldið 5. aug. kl. 21.00: Filmur verður vístur. Nógvur góður tónleikur.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Katrin. Innsavnan verður til húsið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vági**
Sunnudagin kl. 18.00: Møti v/ Jens Vestergaard og Eingrím Holm. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Eysturoyar Gongufelag/kunningarstova**
Gongutúrur verður sunnudagin 5. aug. Gingið verður frá Saksun, eftir bygdagøtuni til Tjørnuvíkar. Túrurin er miðal/tungur. Vit møtast í Tjørnuvík kl. 14.00, har bussur koyrir okkum til Saksunar.

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 13-15.00 á tlf. 212380.

**Tilhaldið**
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
*Frá 3. juli til 17. august er Tilhaldið opið mánadag-fríggjadag kl. 14.00-18.00.*
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

### Vilji faðirsins

Jer. 23, 21 — 22:
*”Eg havi ikki sent profetarnar, og kortini renna teir; eg havi ikki talað til teirra, og kortini profetera teir!*
*Um teir høvdu staðið í ráði mínum og hoyrt orð míni, tá høvdu teir fingið fólk mítt burtur av teirra vonda vegi og frá illverkum teirra.*”

Sunnudagin fara vit at hoyra um ávaringina móti svikaprofetum, ið koma í seyðaklæðum, men eru óðir úlvar innan. Teir skulu verða kendur av fruktum sínum.

Við fruktunum er hugsað um tað, ið sagt verður, smb. trúbótarmonnunum Calvin og Luther. Og soleiðis er tað í Halgubók(NT), at fruktmyndin verður nýtt um tað, ið sagt verður, og ikki um tað, ið gjørt verður. Muðurin mælir tað, sum hjartað er fult av, Luk. 6,43 ff.

Sjálvt um svikaprofetarnir ikki vóru sendir av Guði, bera teir seg so at og profetera í navni hansara.

Fyrrv. danski biskupurin Baun segði einaferð við ungu prestarnar. ”Tað stendur illa til í eini sókn, um bygdaráðsformaðurin svíkur í starvi sínum. Men tað er ein vanlukka fyri eitt sókn, um presturin svíkur á prædikustólinum.” Tí presturin er settur til at vísa veg til frelsu. Svíkur hann her og leiðir burtur, so ber hann ta tyngstu ábyrgd, sum liggja kann á einum mannabarni. Tað er jú hin æviga sælan hjá menniskjum, tað ræður um. Tí sigur Harrin: ”Vei hirðunum, ið oyða og spjaða!”(Jer. 23, 1). Tann oyðir og spjaðir, ið ikki heldur seg til orð Guðs.

”Um teir høvdu staðið í ráði mínum, høvdu teir boðað orð míni”, sigur Harrin. At standa í ráði Harrans er at liva í áliti á hann og í støðugari lýðan á orð hansara. Tað ger hin sanna profeturin. Tí kallar hann eisini fráfallin til umvendingar og bót.

Tað gera svikaprofetarnir ikki. Teir boða ”ein kærleiksfullan Guð”, hvørs orð ið eingin skal taka fyri fult. Men tað er ein sjálvgjørd mynd av Guði, sum leiðir í óføri og verður til týningar teirra. Tí hon er følsk. Guð er kærleiki og ger seg til eitt við okkum, men hann er eisini hin halgi og hátt upphevjaði, hvørs orð eru sonn og verða til ævigar tíðir.

”Ikki hvør tann, sum sigur til mín: ”Harri, harri”, skal koma inn í himmiríki; men tann, ið ger vilja faðirs míns, sum er í himlunum.” (Matt. 7, 21). Soleiðis endar sunnudagsteksturin.

**Niels Pauli Danielsen**